

# Ósemja í OPEC um oljuframleiðsluna

**Jógvan Hugo Gardar**

23.08.2015 - 15:57

Oljan.fo

Fleiri lond í felagsskapinum av oljuframleiðandi londum, OPEC, royna at leggja trýst á Saudi-Arabia, so landi vil minka um oljuframleiðsluna, skrivar tíðindastovan Ritzau, við Daily Telegraph sum keldu.

Daily Telegraph skrivar at Algeria, Venesuela og Iran hava roynt at leggja trýst á Saudi-Arabia, fyri at fáa landið til at gera eina roynd at fáa oljuprísin at hækka frá núverandi príslegu. Saudi-Arabia tók í november avgerð um at framleiða 10,6 milliónir føt av olju um dagin. Hetta ger tað óhugsandi hjá hinum OPEC-londunum at fáa betri prís fyri oljuna.

Wall Street Journal skrivar at keldur í OPEC siga at sum støðan er, so flýtur marknaðurin í olju frá Saudi-Arabia, og hetta ger at ikki er pláss til onnur framleiðslulond.

OPEC-londini hava sett sær eitt mark sum eitur at framleiðast kunnu 30 milliónir føt av olju um dagin. Saudi-Arabia og londini í Persiaflógvanum framleiða sum er 18 milliónir føt.